Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	12.01.2026
Mál nr.:	25/28403
Málsviðgjørt:	HI
Ummælistíð:	14/11/25 – 05/12/25
Eftirkannað:	12.12.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um pantskipan fyri íløt
(Ásetan av panti og rakstrargjaldi, tá skjalprógv vantar frá innflytara ella framleiðara)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 40 frá 16. mai 2024 um pantskipan fyri íløt, sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 11. apríl 2025, verður aftan á § 4, men áðrenn yvirskriftina yvir § 5, sett:

"**§ 4 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at verður skjalprógv ikki veitt innan ásettu freist sambært § 4 stk. 2, 2. pkt., kann pantumsitarin krevja eina upphædd, grundað á tað hægra vekttalið ella litratalið upplýst av TAKS, av vøru fevnda av § 2, stk. 2.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um upphædd, roknihátt, gjaldfreist, rætting av kravinum, afturbering av goldnum kravi, og burturfall av kravinum, fevnt av stk. 1.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at krav, sum ikki kann rættast, orsakað av vantandi skjalprógvi, innan ásetta gjaldfreist sambært stk. 2, stendur við, hóast rættað skjalprógv verður veitt, eftir at gjaldfreistin er farin.
Stk. 4. Rinda innflytarar ella framleiðarar ikki kravið innan ásettu gjaldfreist sambært stk. 2, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.
Stk. 5. Krav, sum er fallið til gjaldingar sambært stk. 2, kann verða innheintað av TAKS við panting ella við afturhaldi av A-inntøku eftir somu mannagongdum sum § 4, stk. 6 og 7."

§ 2

Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð, nær henda løgtingslóg kemur í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
IRF hevur í arbeiðinum at menna innkrevjingarskipanina til pantskipanina staðfest, at tær upplýsingar, sum TAKS kann veita í sambandi við innflutning av vørum, fevndar av lógini um pantskipan fyri íløt, ikki eru nóg neyvar til at kunna staðfesta pant og rakstrargjald eftir.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært løgtingslógini um pantskipan fyri íløt, veitir TAKS pantumsitaranum skjøl fyri framleiðslu og innflutning, so hvørt sum hetta kemur fyri í skipanini hjá TAKS.

Pantumsitarin ásetir síðani pant og rakstrargjald, grundað á upplýsingarnar um innihald, nøgd, støddog slag av ílati.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Tollrokning, sum er tað skjalið, sum TAKS letur í sambandi við innflutning, hevur upplýsingar um litratal, vekt og vørunummar, men har mangla upplýsingar um innihald, mongd, støddog slag av íløtum.

Mongd og støddá ílati er avgerandi fyri, um gjaldast skulu tvær ella fýra krónur, og hvussu nógv íløt gjaldast skal fyri.

Slag av ílati er avgerandi fyri, um tað er fevnt av lógini, t.d. eru pappíløt til djús ikki fevnd av lógini, meðan plastíløt til djús eru fevnd av lógini.

Innihaldið í ílatinum er eisini avgerandi fyri, um ílatið er fevnt av lógini, t.d. er Cocio ikki fevnt av lógini, orsakað av, at tað inniheldur mjólkarúrdráttir, men tað er undir sama vørunummari sum sodavatn.

Fyri at kunna finna útav røttu upphæddini at uppkrevja, verður tí neyðugt hjá pantumsitaranum at venda sær til innflytaran, fyri at fáa neyðuga skjalprógvið fyri innihald, mongd, slag og støddá ílati.

Sambært galdandi reglum í lógini um pantskipan fyri íløt, hevur pantumsitarin ikki møguleika at gera eitt uppkrav, fyrr enn upplýsingar um mongd, støddog slag av ílati og innihald eru veittar.

Hetta kann taka langa tíð, um innflytarin ikki fylgir ásettu reglunum um veitan av upplýsingum, tí so má landsstýrisfólkið sambært eftirlitsásetingini í § 10 geva boð um at fáa upplýsingarnar útflýggjaðar, og um boðini ikki verða fylgd, verður talan um eitt revsimál, sum er fevnt av § 12 um sekt, sum má roynast í rættarskipanini.

Fyri at gera innkrevjingina av panti og rakstrargjaldi so einfalda sum gjørligt í tí føri, at ein innflytari ella framleiðari ikki veitir neyðugt skjalprógv rættstundis, verður neyðugt at geva pantumsitaranum heimild til at krevja inn pant og rakstrargjald sambært upplýsingunum um vekt og litratal, sum eru á tollrokningini.

Ein avbjóðing við at nýta litratalið og vektina á tollkvittanini sum grundarlag fyri innkrevjing er, at tað kemur fyri, at feilir henda, so tað ikki er samsvar millum vekt og litrar, t.d. kunnu 100 litrar standa at viga 300 kilo.

Hetta kann eisini koma fyri, sjálvt um talan ikki er um ein feil. Summar drykkjuvørur við alkoholinnihaldi gjalda avgjald eftir litrum reinum alkoholi, og ikki eftir samlaða litratalinum av vesku, og tá verður eisini munur í litratali og vekt.

Tað er innflytarin, sum tøppar upplýsingarnar inn í ta sjálvvirkandi skipanina hjá TAKS, sum tollrokningin verður gjørd eftir. Sjálvt um mistøk verða rættað í skipanini hjá TAKS seinni, verður tað ikki sjálvvirkandi rættað samsvarandi í skipanini hjá pantumsitaranum, tí hetta eru tvær ymiskar skipanir, sum ikki eru knýttar saman.

Fyri at tryggja, at ikki verður goldið ov lítið í panti og rakstrargjaldi, verður mælt til, at heimilað verður at nýta tað hægra talið - tað veri seg litrar ella vekt - sum grundarlag fyri innkrevjing.

Hetta eggjar eisini innflytarum og framleiðarum til at veita skjalprógv, fyri ikki at gjalda meira í panti og rakstrargjaldi, enn neyðugt er.

Eisini eru ásetingar um panting, framda av TAKS, fyri ógoldnar rokningar. Hetta er fyri at fáa samsvar millum tilmæltu lógarbroytingina og § 4 í løgtingslógini, har panting, framd av TAKS, er partur av innkrevjingarskipanini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið gevur pantumsitaranum heimild til at krevja inn pant og rakstrargjald samsvarandi hægra vekt- ella litratali, sum eru á tollrokningini.

Hetta er fyri at gera innkrevjingina av panti og rakstrargjaldi so einfalda sum gjørligt í tí føri, at ein innflytari ella framleiðari ikki veitir neyðugt skjalprógv fyri ásetan av røttum panti og rakstrargjaldi rættstundis.

Hetta eggjar eisini innflytarum og framleiðarum til at veita skjalprógv, fyri ikki at gjalda meira í panti og rakstrargjaldi, enn neyðugt er.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:

Handilsvinnufelagnum
IRF
TAKS
Fíggjarmálaráðnum
Poul Hansen
Poul Michelsen
Landshandlinum
Rúsdrekkasølu Landsins
Føroya Bjór
FK
Damfar
Rumbul
SMS

Faer Isles
OY
Biskupskeldu
Dism
Kjølbro
Elding
Brell

Eingi ummæli komu inn.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið áleggur TAKS at fremja panting ella afturhald í A-inntøku fyri eftirstøðu. Uttanríkis- og mentamálaráðið metir ikki, at panting ella afturhald fyri eftirstøðu sambært tilmæltu lógarbroytingini broytir nakað fyrisitingarligt ella fíggjarligt hjá TAKS í hesum sambandi, tí talan er um eftirstøðu, sum longu er fevnd av § 4, sum TAKS eisini skal panta ella afturhalda fyri. Einasti munurin er, at eftirstøða sambært tilmæltu lógarbroytingini tekur seg upp fyrr, enn møguligt er sambært § 4 í løgtingslógini.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ásetingar, sum í fyrsta umfari heimila at áleggja pant og rakstrargjald, grundað á tað pantskylduga vørunummarið, litratalið ella vektina – sjálvt um ílatið ella vøran ikki er pantskyldug. Hetta merkir, at um ein innflytari ella framleiðari ikki veitir neyðugt skjalprógv fyri rætta áseting av panti og rakstrargjaldi, kann viðkomandi fara at gjalda ov nógv, ella gjalda fyri vøru ella ílat, sum ikki er pantskyldugt. Viðmerkjast skal tó, at man kann frá pantumsitaranum fáa afturborið tað, sum er goldið ov nógv við panting, framda av TAKS, um kravda skjalprógv verður veitt.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin millumtjóðasáttmáli er á økinum

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við Hoyvíkssáttmálan (sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), EMRS, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið áleggur TAKS at fremja panting ella afturhald av A-inntøku fyri eftirstøðu sambært ásetingum í lógarbroytingini.

Endamálið er at tryggja, at pant- og rakstrargjøld kunnu verða uppgjørd skjótt og endaliga, soleiðis at innheinting hjá TAKS kann fremjast uttan óvissu um endaliga kravið.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Fyri at tryggja einfalt gjaldsgrundarlag, verður tað heimilað landsstýrisfólkinum at áseta reglur um at krevja pant og rakstrargjald, grundað á innflutta vekt ella litratal, alt eftir, hvat er hægra talið, um innflytari ikki innan ásetta freist veitir skjalprógv fyri tal av innfluttum íløtum.

Landsstýrisfólkið fær eisini heimild til at áseta nærri reglur um freistir, roknihátt, upphæddir, rættingar og gjaldfreistir.

Endamálið er at tryggja, at pant- og rakstrargjøld kunnu verða uppgjørd skjótt og endaliga,

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

avtalur og reglur					
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Fyri at tryggja einfalt gjaldsgrundarlag, verður tað heimilað landsstýrisfólkinum at áseta reglur um at krevja pant og rakstrargjald, grundað á innflutta vekt- ella litratal, alt eftir, hvat er hægra talið, um innflytari ikki innan ásetta freist veitir skjalprógv fyri tal av innfluttum íløtum.

Landsstýrisfólkið fær í stk. 2 heimild til at áseta nærri reglur um freistir, roknihátt, upphæddir, rættingar og gjaldfreistir.

Endamálið er at tryggja, at pant- og rakstrargjøld kunnu verða uppgjørd skjótt og endaliga, soleiðis at innheinting hjá TAKS, sambært stk. 5, kann fremjast uttan óvissu um endaliga kravið.

Hetta merkir, at um innflytari ikki veitir kravda skjalprógvið innan freistina, stendur krav um pant og rakstrargjald við, sambært stk. 3, hóast innflytari seinni veitir rættað skjalprógv.

Eitt dømi um, hvussu heimildin væntast at verða nýtt: Ein innflytari, sum sambært tollupplýsingum hevur innflutt 100 litrar á 300 kg av vøru, fevnda av pantskyldu, men ikki veitir neyðugar upplýsingar um íløtini innan ásettu freist, verður kravdur at gjalda 300 kg / 0,33 kg × 2,50 kr., svarandi til 2.272 kr.

Hetta svarar til, at man sum útgangsstøði viðger vektina, sum er tað hægra talið, sum um tað var latið á íløt á 33 cl, sjálvt um tað í veruleikanum var í 50 cl plastfløskum ella 75 cl glasfløskum.

Orsøkin til, at stk. 1 vísir til hægra vekt- ella litratal, er tann, at tollrokningin, sum er skjalið, ið upplýsir, at vøra, fevnd av lógini, er innflutt, vísir bæði litrar og vekt á tí innflutta.

Tað kemur fyri, at tað ikki er samsvar millum teir upplýstu litrarnar og vektina, so fyri at tryggja, at pantskipanin ikki fer at krevja ov lítið í panti og rakstrargjaldi av tí innflutta, og fyri at fáa innflytaran at koma við teimum røttu upplýsingunum fyri ikki at gjalda ov nógv, verður mælt til, at pantumsitarin skal uppkrevja samsvarandi tí hægra talinum.

Heimild er í stk. 2 fyri rætting av kravinum, um fullfíggjað skjalprógv verður veitt áðrenn gjaldfreistina.

Somuleiðis er eisini heimilað í stk. 2, at eitt innheintað krav, frátrekt innheintingarkostnað og rentutilskriving, kann berast aftur av pantumsitaranum fyri tann partin, sum er goldin ov nógv, um skjalprógv verður veitt eftir gjaldfreistina, men tá verður tað einans talan um afturbering, tí tá málið er givið TAKS til panting ella afturhald í A-inntøku sambært stk. 5, verður upphæddin ikki broytt.

Orsøkin til, at uppskotið er lagt fram sum ein heimildaráseting, er tann, at IRF enn er í gongd við at byggja upp skrásetingarpartin og innheintingarpartin av pantskipanini, og áðrenn IRF er liðugt við hetta arbeiði, er ikki ráðiligt at áseta mannagongdir fyri skráseting og innheinting beinleiðis í lógina.

Til § 2
Ætlanin er, at lógaruppskotið kemur í gildi á vári 2026, samstundis sum løgtingslógin um pantskipan fyri íløt kemur í gildi.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 12. januar 2026

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur